## Inn beinanvegin

Danska Sjóferðslustýrið hevur nú givið boð um, at tey trettan skipini hjá reiðarínum Folmer & Co. skulu til lands beinanvegin. Herfyri fekk reiðaríið forboð fyri at reka skipini, tí tað hava verið nógv fleiri arbeiðsvanlukkur umborð á hesum skipunum enn umborð á øðrum donskum farmaskipum. Men reiðaríið valdi at lata skipini halda fram hjá øðrum reiðarii. Men tað gongur ikki, tí Sjóferðslustýrið vil sleppa at kanna skipini beinanvegin.

## Duldi frágreiðing

Politiska andstøðan í Noregi er í øðini, eftir at tað er komið fram, at fiskimálaráðið hevur dult eina frágreiðing frá 2005, sum vísti, at Stórtingið mátti játta tilbúgvingini 50 mió. krónur eyka í 2006 og aðrar 70 mió. krónur eyka í 2007, fyri at tilbúgvingin kundi sigast at vera álítandi. Børge Brende úr Høgra, sum sjálvur er fyrrverandi ráðharri í umhvørvismálum, sigur, at tað kann als ikki góðtakast, at fiskimálaráðharrin hevur dult tilmælið.

# skal hava nýtt skip



*Finnur Fríði er nýggjasta skipið hjá P/F Vinnuni, men gongst sum ætlað hjá gøtumonnum, kemur nýtt skip í flotan um ikki so langa tíð*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

fær størri virði.

- Vit fara helst at bíða nakað enn við at fara á sild við hinum skipunum, soleiðis at meira fæst burtur úr henni.

Í fjør samstarvaðu skipini, Tróndur í Gøtu, Finnur Fríði og Jupiter, á sildini, soleiðis at tvey skip partrolaðu, meðan tað triðja sigldi inn við veiðini – og soleiðis skiftust tey um at tóga og sigla til lands.

- Hetta riggaði óføra væl, og soleiðis fara vit at gera aftur í ár.

Jákup Jacobsen sigur, at meginparturin av sildini, sum felagið veiddi í fjør, fór til matna – í Føroyum, Hetlandi og Danmark.



*- Nýggja skipið verður antin bygt í Noregi ella Danmark, sigur Jákup Jacobsen, reiðari, sum her heldur røðu, tá Finnur Fríði varð navngivin í Noregi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Eg tosaði til Bretlands í gjár fyri at fregnast um fiskaprísir, men sum eg skilti, eru teir ikki so góðir í løtuni, sigur Jákup Sólstein*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Skipini høvdu nokk sloppið av við fiskin

**- Tað hevði verið er keðiligt, um vit fingu verkfall, tí hetta hevði gjørt viðurskiftini eitt sindur truplari. Men skip og manningar vóru avklárað við støðuna og skuldu nokk sloppið av við fiskin, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gólvini á føroysku fiskavirkjunum vóru turr mánakvøldið, sum sáttmálin millum arbeiðsarafeløg og arbeiðsgevarar gekk út á midnátt í gjárkvøldi.

Í morgun fekst so semja í lag millum partarnar á privata arbeiðsmarknaðinum, og tí verður eingin arbeiðssteðgur á hesum sinni.

Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag, vísir á, at fleiri skip vóru inni og landaðu í síðstu viku, og okkurt skip landaði mánamorgunin.

- Men tey skip, sum løgu til at koma aftur av túri mánadagin, hava ivaleyst longu sett kós av landinum.

Hann ivast onga løtu í, at skip og manningar høvdu funnið neyðugar útvegir fyri fiskinum, um partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum ikki komu til sættis í morgun.

Jákup Sólstein vísir á, at bæði skipaeigarar og fiskimenn hava altíð verið fleksiblir, og tí hevði ein møguligur arbeiðssteðgur ikki komið ringast við hjá teimum.

- Eg tosaði til Bretlands í gjár fyri at fregnast um fiskaprísir, men sum eg skilti, eru teir ikki so góðir í løtuni, sum ynskiligt hevði verið. Hinvegin vóru teir heldur ikki vánaligir.

Formaðurin í Reiðarafelagnum reisir tó spurningin, hvussu støðan hevði verið á marknaðinum, um fleiri skip komu við nógvum fiski í senn.

- Tá hevði ikki verið óhugsandi, at fiskakeyparar fóru at gera sær dælt av hesum, so prísirnir fullu, sigur Jákup Sólstein, sum fegnast um, at partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum samdust uttan arbeiðssteðg.